# Sambandsflokkurin, blokkurin og fjølmiðlarnir

JASPUR VANG
løgtingsmaður



**Tað er ógvuliga óheppi, at fjølmiðlarnir í málinum um upptiðningina av blokkinum flyta fokus frá landspolitikkinum, ríkisfelagsskapinum og vælferðini, og heldur dyrka persónsmál og íspinna politiskt stríð, nú okkum mest av øllum tørvar politiskan stabilitet**

Allir føroyingar vita innast inni, at avleiðingarnar av skerjingini og fastfrystingini av blokkinum, nú tað sansar at fíggjarliga, síggjast aftur í játtanunum til eitt nú Sjúkrahúsverki, Almannaverkið og Skúlaverkið, og ikki minst í hallinum á fíggjarlógini.

Skerjingin og fastfrystingin hevði nevniliga við sær, at landskassin seinastu fáu árini er drenaður fyri 3,8 milliardir krónur. Bara í 2009 hevði blokkurin verið heilar 597,5 milliónir hægri, enn hann er, var avgerðin um at skerja og fastfrysta blokkin ikki tikin. Hesi tøl hevur Fíggjarmálaráðið nágreiniliga rokna út, og eru tølini at finna á heimasíðu Føroya Løgtings undir skrivligu fyrispurningunum nr. S24/2009 og S25/2009, sum fíggjarmálaráðharrin svaraði á Løgtingi 17. apríl 2009.

Inniverandi ár hevur Løgtingið kent seg noytt til at skuldarbinda landskassan og harvið eftirtíðina við 500.000 milliónum krónum fyri at rinda hallið á fíggjarlógini og halda samfelagshjólunum malandi. Skuldarbindingin er sjálvsagt ein fylgja av m.a. skerjingini og fastfrystingini av blokkinum. Fíggjarlógarhallið og harav fylgjandi skuldarbindingin verður, sum útlitini eru, ikki minni í 2010. Talan verður sostatt um eina heila milliard krónur ella meira í skuldarbinding, eftir bert tveimum árum.

Hettar er tann beiski veruleikin, vit noyðast at fyrihalda okkum til.

**Boðskapurin frá Sambandsflokkinum**

Sambandsflokkur hevur tí mælt sínum samgongufeløgum til at tiðna blokkin upp aftur, og soleiðis bøta um tann skaða, sum avgerðin um at skerja og fastfrysta blokkin hevur havt við sær. Við øðrum orðum, so velur Sambandsflokkurin sosiala vælferð og samfelagsmenning í ríksfelagsskapi framm um loysingartilgongdina, sum vísir sítt sanna andlit, nú tað sansar at fíggjarliga. At hinir báðir flokkarnir í samgongu og loysingarflokkarnir í andstøðu ikki eru av somu áskoðan og Sambands-flokkurin, er so ein politiskur veruleiki, vit mugu fyrihalda okkum til. So einfalt er tað.

**Fjølmiðlarnir reingja veruleikan**

Tí er tað burtur úr vón og viti, at fjølmiðlarnir lata seg draga eftir hárinum av loysingarflokkunum, og kropp á kroppi gera málið um upptiðningina av blokkinum til ein innanhýsis trupulleika í Sambandsflokkinum og í samgonguni.

At loysingarflokkarnir hava ein forkláringstrupulleika mótvegis teimum borgarum, sum nú kenna sviðan av skerjingini og fastfrystingini av blokkinum, eins og loysingarflokkarnir mugu standa til svars fyri tí veruleika, at landskassin við lántøku í løtuni skuldarbindur okkara eftirkomarar við 500.000 milliónum krónum árliga, fyri at kompensera fyri blokkniðurskurðin, er sjálvsagt veruligi trupulleikin hjá loysingarflokkunum. Ein trupulleiki, sum loysingarflokkarnir av øllum alvi royna at tiga burtur og snúgva sær undan.

Sum tað sær út í løtuni, er tað eisini í ein ávísan mun eydnast loysingarflokkunum at krúpa undan ábyrgdini av egnum gerðum við at og ávirka fjølmiðlarnir soleiðis, at miðlarnir flyta fokus frá tí politiska veruleikanum.

**Dupultmoralsku fjølmiðlarnir dusa sær**

At tað í løtuni sansar at fíggjarliga í okkara samfelag er eingin loyna. Sjúkrahúsverkið leggur trýst á politisku skipanina við eitt nú at skerja tilboðið av viðgerðum uttanlands, av tí at játtanin er brúkt, eins og talið á skurðviðgerðum í Føroyum eftir øllum at døma verður skert restina av árinum vegna sparingar. Eisini innan almannaøkið verður lagt trýst á skipanina, nú fíggjarorka ikki er til øll tey tilboð, sum uttan iva kundu gagnað brúkarunum. Skúlaverkið, eitt nú Fróðskaparsetrið leggur somuleiðis trýst á, fyri at fáa meirjáttan á fíggjarlógini fyri komandi ár.

Her er tað, at dupultmoralur fjølmiðlana veruliga kemur til sjóndar. Fjølmiðlarnir dusa sær nevniliga í teimum trupulleikum, sum fíggjarliga trongstøðan hevur við sær, men seta kikaran fyri ta blinda eygað, og dyrka íspunnar samgongutrupulleikar og persónsstríð, tá Sambandsflokkurin vísir á orsøkirnar til fíggjarligu trupulleikarnar og roynir at loysa teir, eitt nú við at tiðna blokkin upp aftur.

Persónsmál og stríð geva eftir øllum at døma betur yvirskriftir, krevja lítla arbeiðsorku og selja helst eisini betur, enn djúptøkin journalistikkur og landspolitikkur á hægri støði.

Tí er tað ógvuliga umráðandi, at vit eru kritisk og meta um tilfarið, sum fjølmiðlarnir dagliga royna at selja okkum.

Vit skulu minnast til, at tíðindaflutningur er ein handilsvøra.

# Vælferð skerjast ella umskipast

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Í oddagrein í Sosialinum herfyri um sendingina við floksformonnunum á Hvonn, verður formaður Javnaðarfloksins endurgivin fyri at hava sagt, at vælferðin skal skerjast. Eisini verður nevnt, at nútímans javnaðarflokkar ikki himprast við at skerja vælferðina. Sum undirritaða hoyrdi sendingina, segði formaður Javnaðarfloksins, at tað snúi seg um at verja og framtíðartryggja vælferðina.

Skeiva endurgevingin í oddagreinini kemur tó á ein hátt inn í kjarnuna í spurninginum um vælferð.

Hetta er eitt trupult, men neyðugt evni at taka upp. Spurningurin er nevniliga, hvussu tú definerar vælferð. Er ein fimmti ára gomul vælferðarskipan ævug, og skal hon verða tað, hóast samfelagið og kringumstøðurnar broytast. Skal skipanin verða ævug og ikki kunna endurskoðast, so ber ikki til at endurnýggja og umskipa vælferðina, so hon framvegis røkkir sínum endamáli, at koma teimum veiku til góðar.

Vit hava skipannir, við t.d hjálpitólum, har ein persónur við t.d løgtingsmannaløn fær somu hjálputól sum ein einlig mamma uttan at gjalda eina krónu. Er hetta tann vælferðin, ið vit skulu halda fast við, so hava vit ikki fíggjarorku at innføra betri skipannir til t.d stakar uppihaldarar. Hóast hesin bólkur hevur munandi meira hjálp fyri neyðini enn ein løgtingskvinna.

Hetta er ein sera grundleggjandi spurningur, tí vælferðarsamfeløgini vóru uppbygd soleiðis frá byrjan, at almennu skipaninnar vóru universellar og harvið fyri øll óansæð inntøku. Spurningurin er, um tað til ber at broyta ella avmarkað hetta prinsippið og gera skipaninar meira beinraknar til tey, ið hava tær fyri neyðini.

Summi vilja ivaleyst siga, at um ikki øll fáa sín part av vælferðini óansæð inntøku, so vilja tey ikki vera við til at gjalda. So vil samhaldsfasta fíggingin av samfelagnum hvørva.

Sum eg síggi tað, so er hetta ein balansugongd, har tað snýr seg um at finna javnvágina millum tað universala og tað sosialt rætta. Tað er ein sannroynd, at krøvini til betri og fleiri vælferðarskipanir økjast í takt við, at vælferðin økist. Hygg bara at heilsuverkinum. Trupulleikin er, at inntøkurnar at fíggja vælferðina ikki økjast samsvarandi. Tvørturímóti hava allir flokkar verið við til at máa støðið undan vælferðini við at skerja blokkin og geva stórar skattalættar til miðal- og hægri inntøkur, uttan at seta nakað í staðin. Hesar skerjingar eru ikki avloystar av hægri inntøkum, tvørturímóti økist hallið á fíggjarlógini.

Taka vit skattalættarnar og hvør ið hevur fingið ágóðan, eru tað tey, ið hava miðal- og hægri inntøkur. Sostatt er samhaldsfasta fíggingin av samfelagnum avskeiklað. Spurningurin er tí, um hetta ikki kann legitimera inntøkureguleringing av ávísum almennum skipanum.

Javnaðarpolitikkur hevur altíð verið at vilja broytingar, men tað tykist sum um einhvør broyting verður uppfatað sum ein skerjing av vælferðini. Skal onki broytast ella avviklast, so ber heldur ikki til at menna vælferðina, uttan so at inntøkurnar verða øktar munandi. Vit mugu endurskoða gamlar skipannir og finna eina nýggja javnvág millum tað universella og samhaldsføstu fíggingina av samfelagnum. Hetta má gerast, um bera skal til at framtíðartryggja vælferðina. Hetta er ein trupul, men neyðug tilgongd, sum vit, eftir mínum tykki, ikki koma uttanum.

Hin neyðuga broytingin er almenna umsitingin og mátin hon er skipað uppá. Vit hava eina, eftir mínum tykki, sera stirvna skipan, ið stovnsligger alt og øll. Tykist mangan sum siktið er at fasthalda fólk í ymsum almennum skipanum sum klientar, heldur enn at vera hjálp til sjálvhjálp. Hvussu kann almenna umsitingin umskipast, so hon virkar skjótt og væl, er stóri spurningurin.

Tað snýr seg ikki um støddina av umsitingini, men meira um, hvussu gera vit hana einfalda og hóskandi til tann tørv, ið eitt so lítið samfelag sum okkara hevur brúk fyri. Um samfelagið ikki bara skal humpa víðari við einum økjandi trýsti á almennu skipaninar, sum vit kanska so dánt klára at hóra undan, er alneyðugt at taka støðu til hesar spurningar.

# Skattalættarnir hjá Høgna Hoydal

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



**Høgni Hoydal hevur fingið sær til vana at endurtaka uppí saman, at størsta orsøkin til ringu fíggjarligu støðuna sum Føroyar eru komnar í, eru skattalættarnir hjá fyrru ABC-samgonguni. Seinasta dømið um hetta hoyrdu vit í tíðindasendingini hjá Rás 2 á middegi mikudagin 23. september**

Endamálið hjá Høgna við at endurtaka hetta uppí saman, er sjálvandi at fáa fólk at trúgva, at vánaliga fíggjarstøðan hevur einki við niðurskurðin av blokkstuðlinum at gera. Hann vil soleiðis halda sín rygg frían.

Men hvør er veruliga søgan aftanfyri skattalættarnar?

**Sjálvstýrislandsstýrið gav skattalætta**

Tann 19. februar 2003 legði Karsten Hansen (táverandi tjóðveldismaður) uppskot fyri tingið um at lækka landsskattin í 2003 og 2004 við tilsamans 125 mió. krónum. Í viðmerkingunum til uppskotið segði Karsten Hansen, at eitt av endamálunum við uppskotinum var at minka um lønartrýstið, soleiðis at tað ikki elvdi til útholing av reallønini, prísvøkstur, inflasjón og harvið versnandi kappingarføri. Skattalættin skuldi við øðrum orðum vera eitt positivt íkast fyri samfelagsbúskapin.

**Vildu halda fram í 2005 og 2006**

Uppskotið varð eftir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina, har meirilutin (Óli Breckmann, Kristina Háfoss, Tórbjørn Jacobsen og Kári P. Højgaard) skrivaði soleiðis í álitinum: "*Hesin skattalættin er liður í einum langtíðar skattapolitikki, ið hevur til endamáls at lækka skattin á arbeiði. Væntast skal tí í samsvari við samgonguskjalið ein framhaldandi minking í skattatrýstinum í 2005 og 2006.*"

Hetta vísir at Sjálvstýrislandsstýrið ætlaði at lækka skattin øll árini, meðan tey sótu. Men sum kunnugt, slitnaði samgongan í desember 2003, og tí bleiv tað ABC-samgongan, sum kom at standa fyri skattalættunum í 2005 og 2006.

**Hongur ikki saman**

Um tað var skilagott ella ikki at geva skattalættar, kunnu vit altíð kjakast um, men tað tykist løgið, at Sjálvstýrislandsstýrið gav skattalættar og kallaði teir eitt positivt íkast fyri samfelagsbúskapin, men nú aftaná verða somu lættar hongdir, við húð og hár, um hálsin á ABC-samgonguni og lýstir sum størsta orsøkin til ringu fíggjarligu støðuna, sum Føroyar eru komnar í. Her er okkurt, sum als ikki hongur saman.